

Hóast vit skifta orð um, hvar veruligu hendingarnar fóru fram, so er tó eingin ivi um, at Jesus Kristus "eftir anda heilagleikans er veldigliga prógvaður at vera sonur Guðs við uppreisn frá deyðum," (Rómverjabrævið 1:4).

Sjálvur segði Jesus:

"Eg eri uppreisnin og lívið; tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann so doyr, og hvør tann, sum livir og trýr á meg, skal aldri um ævir doyggja; trýrt tú hesum?" (Jóhannes 11:25-26).




Garðurin verð hildin og rikin fyri sjálvbodnar gávur,
sum vitjandi leggja eftir seg.

The Garden Tomb (Jerusalem) Association, England;
sett á stovn í 1893 við tí endamáli at varðveita gravarhellið og garðin uttan fyri borgarmúrin um Jorsalaborg, sum mong halda vera hina heilagu grøv Jesusar og garðin hjá Jósefi úr Arimateu.

VÆLKOMIN TIL

# GRØVINA Í URTAGARÐINUM



Hesin urtgarður er varðveittur av einslistum sum kristin halgistaður, tí at mong halda hetta vera urtagarð Jósefs úr Arimateu, har Jesus varð grivin eftir krossfestingina. Tað er ein óheftur bretskur grunnur við vælgerðareyði, the Garden Tomb Association, ið umsitur urtagarðin. Tygum eru vælkomin at hyggja tygum um í garðinum og at uppliva ta andligu tign, ið hvílir yvir honum.

**Hava tygum spurningar er at venda sær til starvsfólk okkara, sum við gleði svara og vegleiða tygum. Starvsfólk bera frámerki, so tygum lættliga kenna tey burtur úr fjøldini.**

Vit mæla til at byrja við at ganga til høgri og fylgja skeltunum, sum vísa til "Ennistaðin."

Sum tygum standa á pallinum í útryðjuni av urtagarðinum, síggja tygum niður yvir eina farstøð fyri bussar. Vinstrimegin síggja tygum inn í ein hamar og høgrimegin norðursíðuna av múrinum um Gamla Býarpartin. Hetta øki er partur av fornum grótbroti. Eftir gamlari søgn varð grótbrotið nýtt til at avrætta deyðadømd – gýðingar steinaðu og rómverjar krossfestu. Fangar vóru aloftast krossfestir við alfaraveg til tess at ræða onnur, ið ætlaðu at gera uppreistur ella bróta lógina. Hetta var ein hóskandi staður, tí hann liggur við høvuðsvegirnir til Damaskusar og Jeriko. Bíblian sigur okkum frá, at Jesus var førdur út úr býnum berandi kross sín til tann staðin, ið nevndist "Ennistaður" (Golgotha á arameiskum, Calvary á látíni). Har var hann krossfestur saman við tveimum ránsmonnum, meðan fjøld av fólki stóð og háðaði hann ella róptu ókvæmisorð eftir honum, ið tey gingu framvið.

Vit vita ikki við vissu, hvar Jesus varð krossfestur, men staðurin hevur minni at týða enn tann veruliga hendingin: Jesus gekk sjálvboðin í deyðan á krossinum. Hetta var alt partur í stóru ætlan hins góða Guðs at geva okkum fyrigeving syndanna. Bíblian sigur soleiðis frá:

> "Hann bar sjálvur syndir okkara á likami sínum upp á træið...", og "...at Kristus leið eisini eina ferð fyri sydarar, ein rættvísur fyri órættvísar, fyri at hann kundi leiða okkum fram til Guðs...", (Hitt fyrra almenna bræv Pæturs, 2:24 og 3:18).

Eftir gamlari siðvenju er staðurin, har henda undurfulla hending fór fram "Kirkjan á hini heilagu grøv," sum varð bygd í 4. øld undir Konstantini keisara. Henda kirkja stendur nú innan fyri múrarnar um Gamla Býarpartin, og í góð 200 ár hevur ivi valda, um henda kirkja stendur á hinum rætta "Ennistaðnum". Bretski herovastin Charles Gordon var fremstur teirra, ið mettu at grótbrotið (sum nú er farstøð) kundi vera rætti "Ennistaðurin", ið eigur at vera skamt frá býarmúrinum – men uttanfyri. Sum sagt, er ilt at vita, hvat rætt er, men hugtakandi er at síggja, at hamarin er skapaður eins og ein mannaskøltur. Fotomyndin, sum sýnd er fram her á pallinum, vísir okkum, hvussu sjónskur skølturin í hamrinum var fyri 120 árum síðani. Bíblian sigur soleiðis frá:



*Hamarin sum myndar ein skølt*

"Men á tí staði, har sum hann hevði verið krossfestur, var urtagarður, og í urtagarðinum nýggj grøv, sum eingin enn hevði verið lagdur í," (Jóhannes 19:41).

Garðin átti Jósef úr Arimateu, sum í loyndum fylgdi læru Jesusar. Hann fekk serloyvi til jarða Jesu likam í gravarhelli sínum, ið ikki var langt haðani, áður enn sabbatur gýðinga byrjaði.

Um tygum nú spáka innaftur í garðin, koma tygum fram á eitt skelti, sum vísir til gravarhellið. Longri inni koma tygum fram á eina fotomynd í litum, ið fest er at einum træ. Undir jørðini á hesum stað er høgdur regnvatnbrunnur, sum tekur uml. 1 millón litrar og er triðstørstur í Jorsalaborg. Tað er prógvfast, at vatnbrunnurin varð høgdur fyri Kristi føðing í sambandi við vinnuligt virksemi, t.d. ein olivin-, frukt- ella víngarð, sum hevur verið nýttur á døgum Jesusar.



*Hin forna vínpressa*



*Regnvatnbrunnurin*

Um tygum gera eitt rend yvir móti sølubúð okkara, kunnu tygum síggja eina sera væl varðveitta vínpressu. Hon var grivin út í 1924 og er ein hin største, funnin er í Ísraels landi. Vínpressan bendir á, at garðurin upprunaliga hevur verið ein ovurstórur víngarður, sum møguliga hevur verið ogn Jósefs úr Arimateu.

Sum tygum ganga niður trappustigini og standa á hellugólvinum frammanfyri sjálva grøvina, koma tygum til tað virðismesta í øllum garðinum. Grøvin var grivin út í 1867. Tíverri var inngongdin oyðiløgd, møguliga av jarðskjálvta, men varð seinni umvæld við at laga grót uppíaftur.

Fornfrøðingar eru ikki á einum máli um, hvussu gamalt gravarhellið er, men í 1970 segði mæti fornfrøðingurin Kathleen Kenyon tað verða meinlíkt øðrum gravarhellum úr 1. øld.

Merkisvert er, at lýsingin av grøv Jesusar í Bíbliuni svarar nágreiniliga til hesa grøvina:

- Hon er høgd út úr hamarsveggi og ikki skapað við náttúrunnar hond (Matteus 27:60)
- Hon var latin aftur á tann hátt, at stórur steinur varð rullaður fyri, sum høgda sporið út frá munnanum vísir (Matteus 27:60)
- Inni í tí stóra syrgikamarinum er pláss fyri fleiri syrgjandi (Lukas 24:10)

Hesi eyðkenni eins og vínpressan og stórarbeiðið at høgga út regnvatnbrunnin sýna okkum valdið hjá einum so mætum manni sum eittnú Jósefi úr Arimateu. Haraftrat er sjálvur leggstaðurin høgri megin í gravarhellinum (Markus 16:5) og hevur verið sjónskur uttanífrá (Jóhannes 20:6).



*Leggstaðurin*

Vit vita ikki við vissu, um hetta er staðurin, har Jesus varð krossfestur, jarðaður og reis upp. Garðurin svarar nágreiniliga til lýsingina í evangeliunum, og hann hevur brent seg fastan í hugan hjá mongum, sum á hesum staði hava roynt at ímynda sær tær undurfullu hendingar á hinum fyrsta páskamorgni.

"Tit mega ikki ræðast! Tí at eg veit, at tað er eftir Jesusi, hinum krossfesta, tit leita," (Matteus 28:5-6).